Nú skal omman fangast

Erling politistur fer at leggja alla orku í at fáa Trølla Ommuna og Trølla Pætur í geglið á ólavsøku, og hann biður børnini um hjálp

BARNASHOW
Tíðindaskriv

Eftir at hava ligið í langa tíð á Háfjalli, tørna trøllini nú til aftur.

Trølla Pætur og omma hansara hava seinastu tíðina arbeitt við einum nýggjum filmi, og tey hava gjørt upptøkur bæði heima og úti. Tey hava eisini verið á rock ´n roll skeiði uttanlands, og omman er blivin púra vill. Hon hevur lokkað Trølla Pætur til at gera eitt rockshow á ólavsøku, og tað verður tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum.

Har verður mangt og hvat á skránni, nógvir góðir sangir, skemt og ymiskt undirhald.

Vit hava fingið innlit í nøkur skjøl hjá løgregluni, sum siga at Erling politistur ætlar at leggja alla orku í fyri at fanga Trølla Pætur og Trølla Ommuna. Børn, sum hava sæð trøllini, skulu senda eini sms-boð til telefonnummar 261544, so tey kunnu hjálpa til í uppkláringararbeiðnum at finna trøllini.

Tann, sum kemur við bestu ábendingini, vinnur tveir kassar av Jolly sodavatni, og tey børnini, sum ikki hava sent sms til Erling politist, verða avhoyrd í durðinum, tá tey koma til konsertina ólavsøkuaftan og ólavsøkudag.

Danskur gandakallur

Umframt trøllini fer eisini ein danskur gandakallur at undirhalda. Hann kallast Niels Plys og telist millum teir dugnaligastu av sínum slagi í Danmark. Hann ferðast land og ríki runt og vísir síni gandakynstur, spælir klovn og annað.

Hann hevur eini 300 framførslur um árið, hann koyrir 50.000 kilometrar og hann blæsur 25.000 luftballónir upp hvør ár.

Niels Plys byrjaði at undirhalda til stuttleika, men í dag ger hann einki annað uttan at undirhalda børn á ymsan hátt.

Tiltøkini við trøllunum og gandakallinum verða í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum ólavsøkuaftan klokkan 19.00 og ólavsøkudag klokkan 18.30.

Løtan við Teiti Lassen var sum gandað

Mynd: Finnur Justinussen

Tjóvstarta ólavsøkuna hóskvøldið

Hóskvøldið fara nakrir tónleikabólkar á pallin í Studentaskúlanum í Hoydølum. Ætlanin er at tjóvstarta ólavsøkuna

KONSERT
Heri á Røgvi

Ólavsøkan nærkast við øllum tí, ið tjóðarhátíðin hevur at bjóða uppá. Tiltøkini plaga at vera nógv á ólavsøku, og tað skortar heldur ikki í døgunum undan og eftir ólavsøku. Sunnudagin og mánadagin verður sjálv ólavsøkan hildin, men longu leygardagin verður tann árliga ólavsøkukonsertin hildin í Kommunuskúlagarðinum, sum plagar at vera størsta einstaka tónleikakonsertin í árinum.

Longu hóskvøldið - í kvøld – kl. 20.00 vóna fyrireikararnir av einari konsert í Hoydølum at fanga fólk í ólavsøkuhýri. Rútmiskakórið í Hoydølum skipar hóskvøldið fyri einari konsert í samkomuhøllini á Studentaskúlanum í Hoydølum.

Tríggir tónleikabólkar, Páll Finnur Páll, Gruv og Déja Vu, trína fram á pallin fyri at lufta eitt sindur av tí, ið teir hava at bjóða uppá.

Fyrireikararnir lova eitt kvøld við góðum og – til tíðir – eitt sindur øðrvísi tónleiki. Kostnaðurin er 30 kr. fyri eitt atgongumerki, men so sleppur tú eisini at vera alt kvøldið.

Um bólkarnar

Páll Finnur Páll, sum hevur nøkur ár á baki, hevur m.a. spælt á Jassfestivalum og til nøkur hugnakvøld í Hoydølum. Bólkurin, sum er oyrakrás fyri svakar lendar, er í løtuni í studio og taka fløgu upp, sum vónandi kemur út seinni í summar. Talan er um akkustiskan heimagjørdan kattatónleik við undirhaldandi føroyskum tekstum.

Gruv er ein heilt nýggjur bólkur á føroyska tónleikapallinum. Hóast hetta verður fyrsta almenna framførslan, hava limirnir roynt seg áður í øðrum samanhangi so sum Godspell, Daybreak, Cantabile o.ø . Forsangari er Christina Elisabeth Mørkøre. Tónleikastílurin, bólkurin hevur lagt seg eftir, er funk- og soul-ávirkaður pop-tónleikur.

Déja Vu er ein bólkur, sum hevur tikið seg nógv fram í seinastuni. Teir hava m.a. júst verið í Danmark í eini tónleikakapping, har teir stóðu seg sera væl. Déja Vu luttekur eisini á Ólavsøkukonsertini.

Konsertin byrjar kl. 20 í Hoydølum.

Déja Vu verður ein av bólkunum, sum trínur fram á pallin í kvøld – hóskvøldið. Hinar bólkarnir eru Páll Finnur Páll og Gruv

Sólin, regnið og parabolir í Sumba

Teitur Lassen hugtók áhoyrararnar á konsert í Losjuni í Gøtu, har eisini onnur nøvn spældu

TÓNLEIKUR
Johan Jacobsen

Punktum bleiv sett fyri einum sera væleydnaðum G! festivali í Losjuni við Gøtugjógv sunnukvøldið.

Hetta var enn eitt sera væl eydnað kvøld við góðum tónleiki og góðum stemningi. Tríggir bólkar framførdu spennandi tónleik, og áhoyrarnir, sum vóru millum 40 og 50 í tali, tóktust vera sera væl nøgdir.

Trý nøvn gingu aftur á pallinum hetta kvøldið, tey vóru Mikael Blak, Brandur Jacobsen og Valentin. Hesir spældu ávíkavist bass, trummur og el-gittar. Men sjálvt um hesir gingu aftur í øllum trimum bólkunum, so bilti hetta einki.

Heðin Ziska Davidsen Band

Fyrsti bólkurin á kvøldinum legði fyri við eksperimenterandi tónleiki. Kanni væl vera at tónleikurin hjá hesum bólkinum varð skrivaður, meðan hann varð spældur. Eingin sangur var, men ljóðmyndir við merkverdigum og spennandi ljóðum. Ljóð frá einum gittara, nú um dagar, kunnu ofta verða at fara skeivur í. Ta einu løtuna vóru onkur heilt undarlig ljóð uppi í leikinum, minti eitt sindur um snildirnar, sum Bjørk ger brúk av á síni seinastu fløgu.

Sambandið við áhoyraran var so sum so, tónleikurin bleiv kanska ikki serverað ur á silvurfati.

Heðin Z. Davidsen og Valentin Cora spældu gittar, Brandur á trummum, Mikal á bass og Pete Tilly Spældi didjiridu, floytu og eisini ymisk slagverk.

Teitur

Ein serliga spennandi føroysk fløguútgáva er á veg út í handlarnar. Hendan fløgan hjá Teiti Lassen fer uttan iva at verða sera væl móttikin, og tað kann hugsast, at hon fer at selja væl.

Sangirnir av »Sólin og regnið« bleivu allir sera væl móttiknir í Losjuni í Gøtu. Framførslan var góð, og tað var týðuligt, at Teitur hevur roynt hetta at standa á palli, fleiri ferð fyrr.

Sjálvur sigur hann, at hansara tónleikur snýr seg um samskifti við áhoyraran. Millum annað orsaka av hesum syngur Teitur á enskum í útlandinum.

Sangirnir snúgva seg um ymisk ting. Og nevnd verða tøk, t.d. sólina og regnið, og onnur meiri niðri á jørðini, til dømis parabolirnar í Sumba. Ein serliga vakur og rørandi sangur var »Havið«, ið snýr seg um ein gamlan sjómann, sum fer gjøgnum lívið.

Tilfarið á fløguni er meiri akkustiskt og minni elektriskt, tónleikurin minnir um tónleikin hjá Paul Simon. Í studionum hevur Teitur arbeitt saman við Niklas Johannesen.

Hendan løtan í Losjuni var sum ganda og verd allar pengarnar og meiri enn tað.

Lauder?

Valentin Cora sang og spældi gittar í hesum bólkinum, sum endaliga endaði G-Fesivalin 2002. Valentin er úr Argentina og er á eini tónleikavitjan í Føroyum, sum Brandur Jacobsen hevur fingið í lag. Afturat seer hevði hann Brandur, Mikael og til endan kom Pete eisini uppí.

Her var djamm á høgum stigi at hoyra. Tónleikararnir spældu væl og frískliga saman. Valentin bleiv eitt sindur bilsin, tá hann bleiv biðin at skrúva upp fyri gittara sínum. Hetta hevði hann ikki roynt áður; »Lauder?«. Blues Valentin Trio verður aftur at hoyra mikukvøldið á Cafe Natúr.

Fleiri eykaløg bleivu spæld, men endað varð um midnátt. Enn eitt deiligt kvøld í Gøtu.

G-Festivalurin 2002

G-Festivalurin 2002 er sostatt farin afturum, men fyrireikarnir ætla at skipa fyri einum enn størri festivali komandi ár. Vónandi verður eisini okkurt útlendskt navn við tá. Á hesum tiltakinum hevur, burtursæð frá tónleikinum, eisini verið ein lista framsýning í Glyvrahanusarhúsi.

Við á konsertunum hava verið: Blues Valentin Trio (Arg. & Fo.), Clickhaze, Desislava & Valeri Dimchevi (Bulg.), Enekk, Heðin Ziska Davidsen Band, Hanus G. Johansen, Teitur Lassen, MC Hár og Søren Søgaard.

Eitt megnar tiltak við ørgrynnu av góðum tónleiki.

ítróttur

Nr. 140 • hósdagur • 25. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Steypafinalan 2002:

Góðar áskoðaraumstøður

Undan steypafinaluni 2002 millum HB og NSÍ á Tórsvølli er avgjørt, at áskoðararnir hjá báðum liðunum sita savnaðir hvør sær – tað vil siga NSÍ áskoðarar fyri seg og HB áskoðarar fyri seg. Við lutakasti er avgjørt, hvar viðhaldsfólkini hjá báðum liðunum sita

ÁSKOÐARAR
Heini í Skorini

Bæði HB og NSÍ, sum á ólavsøku hittast í finaluni um løgmanssteypið á Tórsvølli, fyrireika seg í hesum døgum til stóru finaluna, ikki minst uttanfyri vøllin. M.a. hevur nógv verið arbeitt við at skapa góðar umstøður fyri mongu viðhaldsfólkunum hjá báðum feløgunum, so stemningurin og karmarnir undan eini góðari finalu verða til staðar.

NSÍ og HB áskoðarar hvør sær

Undan finaluni 29. juli á Tórsvølli er avgjørt, at áskoðararnir hjá báðum feløgunum skulu ikki sita lið um lið, men at allir NSÍ áskoðarar verða savnaðir á einum staði, meðan allir HB áskoðararnir sita saman á øðrum staði. Hetta kenna vit t.d. frá útlondunum, har allir áskoðarar fyri sama liði sita saman, og skapar hetta betri stemning og betri møguleikum fyri.

Við lutakasti er avgjørt, at á langsíðuni skulu NSÍ áskoðarar sita í norðara endanum, meðan HB áskoðararnir verða savnaðir í syðra enda. Henda áskoðaraskipan varð eisini fyriskipað undan finaluni um Løgmanssteypið í fjør millum KÍ og B36, men sum mong kanska minnast, gjørdi veðrið av við bæði fótbóltsspæl og áskoðarar tann dagin, so talið av áskoðarum gjørdist sera avmarkað.

T-shirt til øll

Sum skilst hava bæði feløgini eisini ætlanir um at býta út T-shirts til sínar áskoðarar, so viðhaldsfólkini hjá hvør sínum liði eru eins litt, har NSÍ T-shirtirnar verða gular og HB T-shirtirnar reyðar og svartar.

Leggjast kann afturat, at á atgongumerkjum í forsølu er fast pláss upplýst bæði við bólki, raði og nummari á stóli, meðan á atgongumerkjum í sølu við dyrnar fáa áskoðararnir bert upplýst øki, tvs. tribunu á Tórsvølli.

Teir halda ondini í NSÍ

Undan ferðini til Íslands vóru tveir spælarar leikbannaðir í steypafinaluni, og nú eru tríggir lyklaspælarar sera ivasamir

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Undan steypafinalum er tað meiri enn so komið fyri, at venjarar og feløg hava roynt at gera mótstøðuliðið til favorittar. Men venjarin hjá NSÍ, Jógvan Martin Olsen, hevði einki havt ímóti, ikki at komið við tíðindunum, sum vit fingu frá honum fyrrapartin í gjár.

Harmuligi veruleikin í NSÍ ferðalagnum, sum er á veg úr Íslandi við Norrønu, er, at tríggir av spælarunum, sum hava verið roknaðir millum teir týdningarmiklastu í steypafinaluni ólavsøkudag, eru rættiliga ivasamir.

Talan er um Helga L. Petersen, Pól Thorsteinsson og Ulrik Balling. Á ferðini í Íslandi eru teir allir plágaðir av vøddaskaðum.

Mikukvøldið spældi NSÍ venjingardyst á Akureyri ímóti Þór. Liðið á Akureyri, sum er í bestu deildini, vann 3–1. Sonni L. Petersen minkaði um munin til 2–1, og Jógvan Martin Olsen var sera væl nøgdur við avrikið hjá sínum monnum. Men í løtuni snýr tað seg mest um, hvussu tað verður við skaddu monnunum.

Helgi L. Petersen var ikki við á liðnum í fyrrakvøldið. Undir dystinum noyddust bæði Pól Thorsteinsson og Ulrik Balling at biðja um útskifting.

– Hjá Helga dragnaði okkurt í lærinum undir venjing. Síðsta punktið á venjingarskránni vóru tríggir heilt stuttir spurtir. Tá Helgi skuldi venda, glapp okkurt. Pól bað um at verða útskiftur, tí okkurt var galið við lærinum, og hjá Ulrik Balling er tað í lærkrikanum, at okkurt ikki er, sum tað skal vera, eru døpru tíðindini frá Jógvan Martini Olsen.

Marjun Thomassen, fysioterapeutur, hevur verið við NSÍ í Íslandi. Hon hevur viðgjørt skaddu spælararnar, men tað bar ikki til fyrrenn eitt samdøgur eftir dystin á Akureyri at siga nakað um, hvussu álvarsligir skaðarnir eru.

Allir ellivu á einum fótbóltsliði og allir sekstan í hópinum eru sera týdningarmiklir. Men um tríggir útispælarar skuldu verið útvaldir sum teir týdningarmiklastu hjá NSÍ í finaluni – saman við málverjanum Jens Martini Knudsen, sjálvandi – so hevði tað ikki verið langt frá, at tað vóru teir tríggir, sum nú kappenna við tíðina fyri at vera tøkir í finaluni.

Undan ferðini til Íslands var greitt, at álopsspælararnir Óli Hansen og Sonni L. Petersen ikki kundu spæla í finaluni ímóti HB. Teir eru báðir leikbannaðir.

NSÍ ferðalagið gisti á Egilsstøðum í nátt. Har skuldu teir venja fyrrapartin í dag, og fyrrapartin í morgin koma teir til hús at halda frí, áðrenn farið verður undir síðstu fyrireikingarnar til størsta dystin í 45 ára longu søguni hjá felagnum.

Tað er greitt, at Óli Hansen og Sonni L. Petersen ikki vera við í tí dystinum. Um Pól Thorsteinsson, Helgi L. Petersen og Ulrik Balling vera førir fyri at spæla, frætta vit kanska meiri um seinni í vikuni. At teir halda ondini í NSÍ er lætt at skilja.

Helgi L. Petersen er ein av NSÍ leikarunum, sum nú er ivasamur til steypafinaluna á ólavsøku

U-14 landsliðið góð úrslit í Aberdeen

Føroyska U-14 landsliðið kom aftur úr Aberdeen mánakvøldið, har liðið hevur luttikið í kapping, sum skotska stórfelagið Aberdeen skipar fyri. Tveir sannførandi sigrar og eitt tap var avrikið hjá føroysku dreingjunum

LANDSLIÐSFÓTBÓLTUR
Heini í Skorini

Venjarin hjá føroysku U-14 landsliðnum, Mathias Davidsen, sum dagliga venur 1. lið hjá Skála, letur væl at ferðini hja føroysku u-14 dreingjunum í Aberdeen, og hann er væl nøgdur við avrikið.

Føroyar spældi fyrsta dystin móti írskum liði, og vunnu teir dystin ikki minni enn 7-0. Sambært Mathias Davidsen borðreiddu føroysku dreingirnir við sera skilagóðum fótbólti. Næsti dystur var móti minni skotskum felagi, og hesaferð varð endaliga úrslitið 3-0, sum aftur var ein sannførandi sigur til føroyingar.

Seinasti dysturin var móti sjálvum vertunum úr Aberdeen, og her varð mótstøðan meir enn í undanfarnu dystum. Endaliga úrslitið var 4-1 til Aberdeen, og støðan í hálvleikinum var 4-0 til heimaliðið. Sæð við føroyskum eygum vann okkara landslið seinna hálvleik 1-0.

Mathias Davidsen er samanumtikið væl nøgdur við avrikið hjá Føroyum, og hann sigur, at fleiri sera evnaríkir leikarar eru at finna í 88 árganginum, sum U-14 liðið er mannað av. Í hesum sambandi nevnir venjarin t.d. Kristoffur Jacobsen úr KÍ, sum skeyt fleiri mál, Boga Løkin úr NSÍ og Christian Eli Mouritsen úr HB.

Vunnu minni kappingar

Umframt dystirnar, ið spældir vórðu, skipaði Aberdeen eisini fyri minni fótbóltskappingum. Føttennis varð annað tiltakið, har fýra vórðu á hvørjum liði, og her vunnu føroyingar kappingina.

Eisini vórðu føroysku U-14 dreingirnir á ovastu rók, tá skipað varð fyri fótbóltskapping við lítlum málum og fimm leikarum á hvørjum liði, so ikki kann sigast annað, enn at føroysku leikararnir framdu eitt gott avrik, og er hetta lovandi fyri framtíðina í føroyskum fótbólti.